LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 54-5/2005: Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til frágreiðing niðanfyri samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu** fyri fíggjarárið **2004** við hesum viðmerkingum.

FRÁGREIÐING FRÁ LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM:

## *1. Lógargrundarlag*

Lógargrundarlagið, ið hevur verið galdandi í fíggjarárinum 2004, er løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997 “um Grunn fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu” sum broytt við Ll. nr. 159 frá 19. desember 1997. Í kunngerð nr. 37 frá 30. mars 1998 “um Grunn fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu” ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur fyri umsiting, lán og stuðul úr grunninum.

## *2. Nýtt lógargrundarlag*

11. mai 2004 samtykti Løgtingið løgtingslóg nr. 20/2004 “um landsjørð” og løgtingslóg nr. 21/2004 “um Búnaðargrunn”.

Sambært § 1 í Ll. 21/2004 “um Búnaðargrunn” verður Búnaðargrunnur stovnaður, sum skal veita lán til landbúnaðin og fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina. Sum stovnsfæ yvirtekur Búnaðargrunnurin allar ognir hjá Jarðargrunninum og Grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu, og yvirtekur øll rættandi og allar skyldur hjá hesum grunnum. Við kunngerð nr. 96 frá 22. desember 2004 “um gildiskomu av løgtingslóg um búnaðargrunn” kom løgtingslógin í gildi 31. desember 2004. Við hesari lóg varð Grunnurin fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu tikin av við árslok 2004.

Hesin ársroknskapur er sostatt seinasti roknskapur hjá Grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu.

## *3. Endamál*

Sambært § 1 í Ll. 134/1997 hevði grunnurin til endamáls at veita lán og studning til vakstrarhús og uttandura grønmetisframleiðslu.

## *4. Fyrisiting*

Sambært § 3 í lógini varð grunnurin fyrisitin av einum stýri við 3 limum, tilnevndnum av landsstýrismanninum. Dagliga virksemið varð sambært § 1, stk. 1, í kunngerðini fyrisitið av Føroya Ídnaðargrunni. Føroya Ídnaðargrunnur varð tikin av við lóg nr. 81 frá 8. mai 2001

"um Vinnuframagrunn". Grunnurin hevur síðani verið fyrisitin av Vinnuframagrunninum. Í stýrinum sótu:

Gloria Kalsø, formaður

Reidar Nónfjall

Eirikur Torvaldsson

## *5. Roknskaparviðurskifti*

Sambært § 6, stk. 2, í lógini skuldi ársroknskapurin verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara og síðani verða sendur landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum.

------------

Til tess at kunna Løgtingið um fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 2004, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri árini 2000-2003 tikin við.

## *6. Yvirlit yvir gongdina í rakstrinum 2000-2004*

(t.kr.)

| | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av útlánum | 17 | *17* | *19* | *21* | *22* |
| Rentur av peningi o.a. | 122 | *114* | *216* | *184* | *121* |
| **Inntøkur tilsamans** | **139** | ***131*** | ***235*** | ***205*** | ***143*** |
| Umsiting | 49 | *32* | *36* | *44* | *38* |
| Sett av til tap/avskrivað | 0 | *0* | *105* | *0* | *15* |
| **Ársúrslit** | **90** | ***99*** | ***304*** | ***161*** | ***90*** |

## *7. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 2000-2004*

(t.kr.)

| | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Aktiv:** | | | | | |
| Útlán og eftirstøður | 516 | *554* | *566* | *616* | *736* |
| Sett av móti tapi | -425 | *-425* | *-425* | *-530* | *-530* |
| | **91** | ***129*** | ***141*** | ***86*** | ***206*** |
| Tøkur peningur | 4.763 | *4.631* | *4.521* | *4.272* | *3.992* |
| **Aktiv tilsamans** | **4.854** | ***4.760*** | ***4.662*** | ***4.358*** | ***4.198*** |
| | | | | | |
| **Passiv:** | | | | | |
| Skuld | 9 | *5* | *7* | *7* | *8* |
| Eginogn | 4.845 | *4.755* | *4.655* | *4.351* | *4.190* |
| **Passiv tilsamans** | **4.854** | ***4.760*** | ***4.662*** | ***4.358*** | ***4.198*** |

## *8. Roknskapargrannskoðanin*

Løgtingsgrannskoðararnir skulu m.a. ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum. Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir m.a. á frágreiðing frá roknskapargrannskoðanini, Grannskoðaravirkinum SPEKT, dagfest 5. juli 2005.

## *9. Viðmerkingar*

Sum víst á, er hesin ársroknskapur tann seinasta hja grunninum. Grunnurin fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu er framhald av Vakstrarhúsgrunninum. Í 1990 vóru útlán og eftirstøður um 4 mió.kr. Í 1997 lænti grunnurin út 550 t.kr., annars hevur grunnurin einki útlánsvirksemi havt. Síðani 1990 hevur grunnurin avskrivað 4,3 mió.kr. Í 1999 vórðu harafturat settar av 0,5 mió.kr. móti tapi. Í 2002 vórðu 105 t.kr. inntøkuførdar aftur.

Samanlagt hevur grunnurin mist at kalla alt, sum hann hevur lænt út, og bert ein partur av tilskrivaðu rentunum eru goldnar. Í ársfrágreiðingini heldur stýrið, at í framtíðini fer framhaldandi at verða trupult at fáa rentur og avdráttir inn.

Sambært § 9 í nýggju lógini kann Búnaðargrunnurin avskriva partar av skuldini. Sambært § 10 ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur fyri lánsveiting, herundir rentu- og afturgjaldstreytir, og hvørjar treytir lántakari skal lúka.

Í K. nr. 97 frá 22 . desember 2004 "um Búnaðargrunn" hevur landsstýrismaðurin m.a. ásett neyvari reglur í kapittul 6 um avskriving av skuld.

Løgtingsgrannskoðararnir, 9. februar 2006

Hergeir Nielsen, formaður

Sverre Midjord

Óli Breckmann

Olav Enomoto